# Ruðuleiki í býnum og bilur í Hoyvíkstjørn

**Mánakvøldið legðist kavi kring landið, og vegirnir gjørdust hálir. Vakthavandi á politistøðini í Havn segði í morgun, at tað tykist sum um, at bilførararnir hesaferð als ikki vóru fyrireikaðir til hálkuna**

HÁLKA
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

– Ruðuleiki var í miðbýnum í Havn í morgun. Fleiri smá ferðsluóhapp hava verið, men eisini eru fleiri bilar komnir rættiliga illa fyri í hálkuni í morgun, sigur vakthavandi á politistøðini.

Í morgun klokkan 7.30 vórðu boð send eftir politinum, tí ein bilur var farin av vegnum norðan fyri Sandvíkarhjalla, og ein annar bilur fór rættiliga illa, tá hann fór út av vegnum við Sundsverkið.

Eitt annað heldur sermerkt óhapp var í eysturbýnum í Havn í morgun. Ein bilførarin koyrdi út frá barnagarðinum á Konmansmýru, ætlaði sær út aftur á Hoyvíksvegin, men misti brádliga tamarhaldið á bilinum. Staðin fyri at halda kósina beint fram fór bilurin heldur upp á gongubreytina, av vegnum og niður í Hoyvíkstjørn.

## Verið varin

Á politistøðini í Havn heita tey á øll at ansa betur eftir:

– Áðrenn farið verður frá húsum um morgunin, noyðist hvør einstakur at taka hædd fyri hálkuni. Tað ber rætt og slætt ikki til at fara avstað við bilinum, um hann ikki er nóg væl skøddur, leggur vakthavandi á politistøðini at enda afturat.



*Hesin bilurin endaði niðri í Hoyvíkstjørn í morgun. Hann varð stutt eftir tikin upp av bili frá Brandstøðini á Oyggjarvegnum*


# Hvussu man gangast í Japan?

善

二

[2]

Nógv gjørdust ov sein, tá Føroya Banki fyrr í ár beyð viðskiftafólkum at gera íløgur fyri 100 milliónir krónur í lánsbræv við trygd ímóti at missa ílagda peningin. Men nú kunnu íleggjarar aftur halda seg framat í Føroya Banka.

Frá 20. mars til 7. apríl 2006 ber til at gera íløgur í nýtt lánsbræv, sum fylgir gongdini á japanska partabræva-marknaðinum. Íleggjarar fáa við vissu 1% í rentu um árið. Í mesta lagi kann rentan gerast heili 30% árliga í fimm ára gildistíðini.

Kommuninvest í Svøríki útgevur nýggja lánsbrævið, og Føroya Banki samstarvar við Nordea um útgávuna. Teknast kunnu 200 milliónir krónur hesaferð.

Vilt tú vita meira um nýggja lánsbrævið, set teg so í samband við íløguráðgevarar bankans.



FØROYA BANKI

TEAM85